Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



Jukim Olsen, Tórshavn:

# Kend býarmynd hátíðarhelt 75 ára føðingardagin

**Leygardagin 20. november var móttøka á Hotel Hafnia, í samband við at ein kendur svínoyingur í Havn, Jukim Olsen, helt sín 75 ára føðingardag. Millum 250 og 300 fólk stukku inn á gólvið**

MÓTTØKA

*Myndir: Magnus Gunnarsson*

At Jukim Olsen eigur nógvar vinir, bar móttøkan á Hotel Hafnia leygardagin boð um, tað stóð á at rúma øllum fólkunum, sum komu at heilsa upp á hann á Parnassinum.

Jukim hevur stóra "kontaktflatu" og kennir hópin av fólki. Har komu fyrrverandi starvsfelagar, fólk frá samkomuni í Ebenezer, familja, og fleiri svínoyingar sum búgva í Havn.

Óli Jacobsen og Øssur Berghamar hildu talu, og Evald Sørensen, fyrrverandi starvsfelagi á Matrikulstovuni, framførdi ein sang.

Jukim er sjálvur ein sera trúfastur og uppmerksamur maður. Hann kennir tað sum sína uppgávu at vitja í heimum, á sjúkrahúsum og røktarheimum og halda samband við fólk, sum hava tørv á eini vitjan.

Jukim er eisini kendur frá útvarpssendingum, har hann saman við Niels Juel Arge, útvarpsstjóra, sála, sigldi runt Svínoynna, og Jukim á ein hugtakandi hátt segði frá ymiskum staðarnøvnum og hendingum.

Seinnu tíðina er hann eisini kendur frá sjónvarpslýsingunum við Toyota Yaris.



*Jukim saman við familjuni*



*Sonurin, Jógvan Olsen, spældi klaver*



*Óli Jacobsen heldur talu*



*Jukim Olsen, helt sín 75 ára føðingardag við móttøku á Hotel Hafnia, har millum 250 og 300 fólk stukku inn á gólvið*



*Erling Poulsen, rithøvundur, heilsar upp á Jukim*



*Fyrrverandi starvsfelagar hjá Jukim á Matrikulstovuni, Ólavur Clementsen, Óli Johansen, og Antines Iversen*



*Versonurin, Jógvan Norðbúð, beyð øllum at vera vælkomin*



*Evald Sørensen, fyrrverandi starvsfelagi á Matrikulstovuni, framførdi ein sang*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



## Rannvá Joensen 70 ár

24. november fyllir Rannvá Joensen, Slættalíð 12, Tórshavn, 70 ár.

Foreldur hennara vóru Birita og Edvard Lindenskov, tey búðu tá í Rættará, nú Sigmundargøta 16, tá Rannvá sá dagsins ljós í 1934, men fluttu í august 1938 í Sjúrðargøtu, har runnu barnaárini hjá Rannvá, sum hjá Havnarbørnum flest og tá barnaskúlin var frá hondini, fór hon at royna seg í handligum kynstri.

Fyrsta takið var í fyritøkuni Niels Johannesen, heilsølan í Tórsgøtu, tað var eftir kríggið, tey framleiddu klædnavørur.

Sagt er, at Rannvá var ófør við strúkijarninum, at strúka var ikki bara. Um hetta var duldur kynstur frá ommuni í Baiansstovu veitst ikki, men konufólkini í Baiansstovu struku fyri fólk, um tað var "bara fyri tey fínu" og orlogsskipini, hvør veit? Men vit vita, at fyrsti strúkiovnurin á dampvaskarínum í Tórsgøtu var tann úr Baiansstovu.

Men Rannvá bleiv tó ikki standandi við strúkijarninum – men til stroks fór hon – í sakføraravirkinum



Kehler & Lützen var hon fleiri ár og seinni hjá Landsverkfrøðinginum.

Í 1961 giftast Rannvá og Tummas, og nú hon er vorðin kona hjá langfarasjómanni – og børnini so smátt eru í anmarch – broytist so mangt, tey flyta niður at búgva og koma ikki heim aftur fyrrenn í 1966, tey bygdu síðan húsini í Sløttulíð.

Rannvá var seinni drúgvt skeið á Sjómansheiminum í Havn, har stóð hon fyri tí tey rópa smørbreyðnum. Ófør hevur hon verið, og álit er hon í øllum arbeiði – hon hevur tikið lut í so mongum.

Vit kenna hana eisini frá felagslívi, og har hevur losjan staðið henni næst, tað er ikki tað tiltak, at hon ikki hevur tikið hond í. Og so er ikki at gloyma áhugan fyri føroyskum dansi. Í ungu árunum var hon við í ferð dansifelagsins í Noregi í 1959.

Nú 70 árini eru rokkin hjá teimum báðum, Tummas fylti tann 8., hava tey opið hús í Sløttulíð 12, **leygardagin 27. november frá á middagi,** men mest man tað gleða tey, at døturnar báðar og Kristianna lítla koma heim til dagin.

**j.**

## Frida Hansen 80 ár



Mikudagin 24. november fyllir Frida Hansen úr Klaksvík 80 ár.

Frida er ættað av Norðoyri. Fødd 24. november 1924. Foreldrini vóru Joan Karl Høgnesen bóndi á Norðoyri og Kristianna, fødd Christiansen ættað av Kirkju á Fugloynni. Hon er fimta í røðini av einum systkinaflokki uppá tilsamans átta.

Frida varð gift Jóan Paula Hansen, ættaður av Váli í Svínoy. Jóan Pauli doyði fyri 5 árum síðani. Tey fingu 5 børn. Hildubjartu, Kjartan, Álvur, Frímund og Eyðbjørg. 14 ommu og abbabørn hevur hon fingið, sum hon er serliga glað fyri. Hesi hava fingið manga gávuna frá Fridommu. Tvær ferð higartil er Frida blivin langomma.

Sum ung starvaðist hon nógv í handli, men tá børnini komu, bleiv hon heimagangandi.

Frida hevur luttikið í felgslívi m.a. vóru Frida og Jóan Pauli nógv við í Klaksvíkar Dansifelag. Væl dámar Fridu at stákast rundan um húsini á Heygum. Frida og Jóan Pauli vóru mangan at síggja á Víkini at dyrgja eftir seiði. Hann róði, og hon sæt á rongini við beitu undir tráðuni. Enn dámar henni væl at fara á seiðaberg. Frida er egin at sinni og hevur sínar egnu meiningar um lísvsins viðurskifti. Alt væl ankrað í trúnni á Harran ið øllum valdar.

Mammu verður ynskt hjartaliga tillukku við runda degnum og ein góðan føðingardag, sum verður hildin heima leygardagin 27. november.

**Børnini**

## Olofson komin upp á pláss í Tanzania



*Føroyingar í Tanzania, familjurnar Olofson og Kjærbo, avmyndaðir fyrr í heyst undir eini trúboðarastevnu, hagani myndin stavar. Við á myndini er eisini føroyski lærarin Pætur (aftast h.m.)*

**Fyrr í ár vórðu hjúnini Anne-Lene og Peter Olofson úr Klaksvík sent út úr Christianskirkjuni í Klaksvík sum trúboðarar í Tanzania**

Tey eru nú liðug við málskúlan í býnum Morogoro, og eru nú farin at rigga seg til arbeiðið í og út frá býnum Mbeya. Í hesum staði skulu hjúnini vera lærarar á útbúgvingar-staðnum fyri lokalar prestar hjá Brøðrakirkjuni í Tanzania.

Áðrenn tey av álvara fara til verka fáa tey tó stundir til at innrætta seg og gerast kend í økinum, og ikki minst at læra kirkjuna at kenna.

Í Tanzania finst eisini eitt annað føroyskt trúboðarapar, nevniliga Heri og Malan Kjærbo úr Havn, sum hava verið búsitandi í Musoma. Men frá ársskiftinum er Heri settur sum lærari við bíbliuskúlan í Kiabakari.

## *Tøkk*



Eina hjartans tøkk til tykkum øll, sum valdu Javnaðarflokkin, og ein serlig tøkk til tykkum, ið valdu meg persónliga.
Eisini takki eg fyri vitjanir, blómur, gávur, sms, mail og uppringingar, bæði tey eg havi tosað við, og tey eg ikki fekk orð á.
Harrans signing í framtíðini.

*Heilsan*
**Kirstin Strøm Bech**

### Dagurin

**24. november. Chrysogonos**, deyður umleið ár 300. Halgisøgurnar siga, at hann var kristin einbúgvi, sum varð tikin av døgum meðan Diocletianus var keisari.

†

Kæri maður mín, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Janus í Gong**
**Tórshavn**

andaðist í heiminum sunnudagin 21. november, 57 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer hósdagin 25. november kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Herdis**

Tey, ið vilja minnast Janus, kunnu lata eina gávu til Diabetes Felag Føroya.